
ÚTRÓÐRARBÁTAR

SCANIA 32 **STARLET 32**



Prísur ab. Esbjerg

kr. **498.000,-**

Sera lagalig figging yvir 15 ár

Vit selja eisini nýggjar motorar frá 20 til 500 HK við lagaligari figging

Motor Marine Tlf. 146 29 ella 05 15 20 07

NATUROPATENS

Universalmidlet

– der bør findes i ethvert hjem!

– mod sportsskader, spændinger mensessmerter, migræne, gigt m.m.

Gennem samarbejde med en kinesisk læge, har vi efter gammel kinesisk recept udviklet en fantastisk muskelbalsam, som kan bruges til næsten alt, man ellers tager piller mod. Har man f.eks. tandpine, myoser eller noget af ovennævnte – finder man det samme punkt samt akupunkturpunktet, smører balsammen på og efter kort tid er smerterne væk.

Brugsanvisning medfølger.



Ja tak send mig venligst ——— flaske(r) balsam
Jeg betaler ☐ med vedlagte check ☐ pr. efterkrav + porto
Indsat på ☐ giro 3155013
Navn: ———
Adresse: ———
Postnr: ——— By: ———

Universalmidler til akupunktur uden nåle Rabat: 2 stk. **kun 148.-**

MAÐUR HEVUR VANDAN VIÐ – SUM IKKI AKTAR KOYRISIÐ!

Norrøna Felagið bjóðar til fyrilestur um

Felags framtíð okkara

— Heini Olsen greiðir frá Brundtland-álitinum, sum viðger ætlani ST um menning og framtíð.

Í annaðkvøld kl. 19.30 skipar Norrøna Felagið í Føroyum fyri almennum fyrilestri í Norðurlandahúsinum. Heini Olsen, verkfrøðingur, fer at greiða frá um sonevnda Brundtlandálitið.

Tað var í 1983, at aðalskrivari Sameindu Tjóða setti seg í samband við forsætisráðharra Noregs, Gro Harlem Brundtland. Ørindini vóru, at fáa fremstu kvinnu Noregs at skipa og leiða eina serstaka, óhefta nevnd at leggja til rættis alheims broytingarætlan innan umhvørvi og menning.

Manna millum verður ofta tikið til, at er tað nakað, vit hava felags, er tað framtíðin. Ikki óvæntað gjørdist heitið á álitinum frá Brundtlandnevndini »Our common future«.

Gro Harlem Brundtland

Gro Harlem Brundtland er útbúgvin lækni og gjørdist í 1965 Master of Public Health við lærda háskúlan Harvard. Eftir at hava starvast sum lækni, varð hon umhvørvismálaráðharri 1974-79. Í 1981 gjørdist hon forsætisráðharri og varð afturvald í 1986. Gro Harlem Brundtland umboðar Det Norske Arbeiderpartiet.

Undir leiðslu Brundtlands varð nevndin skipað og helt fyrsta fundin í oktober 1984. Eftir 900 strævnar dagar kundi nevndin leggja fram verkið »Our common future« ella bert Brundtland-álitið, sum tað manna millum verður nevnt.

Ein menning, ið tænir øllum

»— Tá tað snýr seg um menning í dag, eru fleiri tættir, ið støðugt gera alt fleiri menniskju fátækari og veikari, samstundis sum umhvørvið verður avskeplað. Hvussu kann ein sovorðin gongd tæna komandi øld, tá tvifalt so nógv skulu liva í somu skipan?

— Henda sannroynd rúmkaði um metingar okkara. Vit fóru at hugsa um menning sum annað og meir enn ein avmarkaðan spurning um búskaparligan vøkstur í menningarlondunum.

— Vit komu til ta niðurstøðu, at tørvur er á at ganga nýggjar leiðir; leiðir, sum kunnu skapa menniskjanslig framstig, ikki bert á nøkrum fáum blettum í nøkur fá ár, men um allan heimin og inn í eina fjara framtíð.

— Ein menning, ið tænir okkum øllum, er tí ikki bert eitt mál fyri menningarlondini, men eisini fyri idnaðarlondini«.

(Brot úr »Our Common Future« ST 1987)

Verkfrøðingur við altjóða royndum

Fyrilestrahaldari í Norðurlandahúsinum mikudagin 15. mars er Heini Olsen, verkfrøðingur. Hann er føddur í Vestmanna 1930.

Heini Olsen tók prógv sum verkfrøðingur í 1956 og arbeiddi í 1963 við vegagerð í Iran. Fyrstu tvey árini hjá enskum felag og hini fimm árini hjá Kampsax.

Í 1963-65 starvaðist Heini hjá Holbøk Amts Vejvæsen og síðani 1965 hevur hann verið hjá Landsverkfrøðinginum, har hann er leiðari á vegprojekteringsdeildini.

Í 1973-74 varð Heini Olsen lænt út til Kampsax í starv, fyriskipað av Sameindu Tjóðum í Afghanistan. Í 1977-78 vóru aftur boð eftir honum. Hesuferð høvdu Sameindu Tjóðirnar bruk fyri kunnleika hansara í Negeriu. So ikki kann sigast annað, enn at Heini Olsen hevur sett spor eftir sær.

Nærvarp Okkara

Nærvarp Okkara í Keypmannahavn hoyrist hvønn sunnudag á 98,9 MHz (FM) frá kl. 13.00 til 15.00.

Á skránni eru søgur, ummæli, tónleikur, tíðindi og lýsingar.

Lýsingar, viðmerkingar o.a. kunnu ringjast inn á tlf. 01228401, í senditíðini tó 01132807.



KFUK

Vargleði í dag kl. 16.00.

Dagsglæman í Vági í dag kl. 15.30 í Meinigheitshúsinum.

Blindastovnurin við Íslandsvegin

Týsdag kl. 15.00: Handaligt ítriv.
Mikudag kl. 19.00: Blindskrift.
Hósdag kl. 19.00: Handaligt ítriv.
Tilboðini eru fyri øll sjónveik.



NÚ er at spenna **BELTINI**

Amnesty International Føroya Deild

er opin mánadag, mikudag og friggjadag kl. 11.00—16.00 á Bryggjubakka.

Tlf. 158 16